Nýtt savn fyri Williami Heinesen

Í framtíðini fer at verða høvið hjá bókmentafrøðingum, listafólkum og øðrum borgarum at vitja í nýggjum Heinesen-savni í havn. Hetta savn skal hýsa øllum tí rúgvismikla tilfarinum sum mæta skald okkara William Heinesen legði eftir seg.

MENTAN
Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo

Havn: Tórshavnar býráð hevur nevniliga tikið undir við at ein óheftur grunnur verður settur á stovn, sum skal reka eitt slíkt savn.
Við til ognina hoyra sethúsini, eitt hoyggjhús/fjós og so "hyttan", har William vanliga sat og skrivaði.
Grunnurin, sum í framtíðini skal eiga ognina á Varðagøtu, fer at fáa eina eginogn uppá 275.000 kr., eins og kommunan letur ein stuðul uppá 800.000 kr. til at gera ognirnar í hóskandi standi.
Haraftrat veitir kommunan eina bindandi játtan um ein árligan rakstrarstuðul uppá 50.000 kr. og rindar eitt møguligt hall uppá 50.000 kr. um árið tey komandi 10 árini.
Hinvegin er eisini samband fingið við donsku fyritøkuna Velux, sum vanliga selur tøk og vindeygu, men sum fegin vil stuðla einum slíkum savni og grunni við peningi.
Arvingarnir hava eisini verið fegnir um hetta stigið, tí soleiðis kann alt tað sum finst í húsinum av søguligum verkum, lutum og bókum verða varðveitt.

Húsini hjá Williami Heinesen í Varðagøtu verða nú til savn
mynd: Jens Kr. Vang

Tey standa so trúfast í kø og bíða eftir einum av teimum 50 0 plantupakkunum

500 plantupakkar til fólkið

Í gjár endaði umhvørvisvikan í Havn. Fleiri tiltøk vóru um vikuskiftið, m.a. við ruddingartiltaki og útflýggjan av plantupakkum til havnarborgarar.

UMHVØRVI
Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo

Havn: : Kl. 10 leygarmorgunin sást ein long kø av fólki standa og bíða úti á Skálatrøð. Øll høvdu tað sama fyri eyga: At fáa ein plantupakka útflýggjaðan.
Í pakkanum vóru fimm ymiskar berrótaplantur, sum tí mugu setast niður beinanvegin.
Planturnar eru álíkar teimum sum vórðu útflýggjaðar í fjør.
Samstundis sum fólk kundu fáa plantupakkan í Havn, var møguligt at gera tað sama hjá umsjónarmonnunum í hinum bygdunum í kommununi – Kollafirði, Nólsoy og úti í Hesti.
Tær fimm planturnar eru sløgini Aronia, Weigela, Bálu Kotoneastir, Hyll og Bjarkar Spirea.

Gásadalur fær eisini gøtunøvn

Um stutta tíð verður ikki longur neyðugt at siga húsini hjá Karli, Dávuri ella Dagny í Gásadali. Nú skulu bæði Gásadalur og Mykines hava gøtunøvn og gøtunummar.

Hetta er eitt av málunum, sum Matrikulstovan hevur sett sær fyri. Og hesi áheitan ætlar Sørvágs kommuna sær eisini at fylgja.

Á seinasta fundi sínum samtykti bygdaráðið tí at seta niður tvær nevndir at taka málið upp við setan av gøtunøvnum fyri tær báðar vestastu bygdirnar í kommununi.

Í nevndina, sum skal fyrireika hetta í Mykinesi vórðu valdir: Steingrím Abrahamsen sum er formaður, og Oskar Joensen og Jákup í Løðu.

Nevndin fyri Gásadal er mannað við hesum monnum: Gutta Petersen sum er formaður, og Dávur Joensen og Solberg Henriksen.

Um stutta tíð fáa hesar báðar lítlu bygdirnar eisini gøtunøvn.

-SB

Olja:
Føroyskt felag standa fyri tilbúgvingini

OSR á Tvøroyri skal taka sær av møguligum oljudálkingum við boringarnar í summar

Um ólavsøkumundið fer Statoil at gera boringar í føroyskum sjóøki. Til hetta krevjast nógv ymisk viðurskifti at vera í lagi, m.a. tilbúgvingin um oljudálking verður í havinum.

Í Føroyum finst eitt felag sum hevur serkunnleika til hetta, og tað er OSR (Oilspill Response Faroes) á Tvøroyri. Við boringarnar hjá Statoil í summar verður tað hetta felagið sum skal hava tilbúgvingina um hendi. Enn er sáttmálin kortini ikki undirskrivaður, men verður tað ein av allar fyrstu døgunum, skilst.

Hetta eru góð tíðindi hjá stjóranum, Paula Einarsson.

– Ein slíkur sáttmáli betýðir alt fyri okkum. Uttan sáttmálar kann OSR ikki liva, sigur hann við Portalin.

Í løtuni er støðan hon, at teir ikki hava so nógvar aðrar sáttmálar, og tí kom hesin komandi sáttmálin við Statoil væl við.

– At vit nú hava fingið henda sáttmálan kann hava við sær, at onnur fáa eyguni upp fyri okkum. Tí er ikki óhugsandi, at vit fara at fáaenn fleiri sáttmálar, sigur ein bjartskygdur Pauli Einarsson.

-SB

Pauli Einarsson, stjóri á OSR